Heystið í Føroyahúsinum

Nú summarið fer at halla byrja tiltøkini av álvara aftur í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. 7.september verður dansur við Tangz, og 27. verður kafekvøld við drama, upplestri og sangi í húsinum. Í samband við at felagið Neystið hevur 15 ár á baki, verður skipað fyri veitslu í Føroyahúsinum leygardagin 5.oktober. Og fríggjakvøldið 11. oktober skipa Føroyahúsið og Meginfelag Føroyska Studenta, MFS, fyri Mentanarnátt í Føroyahúsinum. Av øðrum tiltøkum í Føroyahúsinum í heyst kunnu nevnast teir regluligu týsdagsdøgverðarnir, har borðreitt verður við ymsum føroyskum mati, so sum knettum, røstum fiski, kalva og turrum fiski, og í oktober ætla tey millum annað at borðreiða við havhestaungum. Týsdagar verður boðið til borðs í Føroyahúsinum kl.17.30.

Vitjanartænasta til eldri føroyingar í Keypmannahavn

Føroyahúsið arbeiðir við at fáa í lag eina vitjanartænastu. Tvær kvinnur hava játtað at taka sær av at vísa á eldri, einligar føroyingar í danska høvuðsstaðnum, sum kunnu hugsast at vilja hava vitjan. Í september-blaðnum hjá Føroyahúsinum stendur at lesa, at størsti trupulleikin hevur verið at finna fram til tey, sum tænastan er ætlað til. Fyrireikarnir hava spurt seg fyri, m.a. á ellisheimum og hava eisini lýst í føroysku bløðunum, men sera fá hava gjørt vart við seg, siga tey í Føroyahúsinum. Tey ivast tó ikki í, at fleiri eldri føroyingar búgva á Keypmannahavnar-leiðini, sum høvdu verið fegin um at fingið vitjan. Fyrireikarnir sóknast nú eftir fólki, sum hava hug at gerast partur av vitjanartænastuni – bæði fólk, sum kunnu fara út at vitja, og fólk, sum kundu ynskt sær vitjan. Áhugað kunnu siga frá í Føroyahúsinum.

Málsligar vegleiðingar

Málnevndin kemur á 57.sinni við sínum viðmerkingum og vegleiðingum til føroyska málið í málbrævinum Orðafar.

Góð ráð um føroyska málið, bæði í skrift og talu, eru at finna í málbrævinum Orðafar, sum málnevndin gevur út. Orðafar kom út á fyrsta sinni í november 1986, og um dagarnar kom út 57.útgáva av Orðafar. Føroyska málnevndin, sum varð sett á stovn í 1985, er vald fyri fýra ár í senn og er mannað við fólki úr Føroyamálsdeildini, Mentamálaráðnum, Blaðmannafelagnum, Rithøvundafelagnum og Móðurmálslærarafelagnum.

Í reglugerðini fyri málnevndina stendur, at hon skal »hava eyguni eftir málspillu, sum er um at taka seg upp, og royna at forða fyri, at hon festist«. Málnevndin skal gera vart við, tá t.d. tíðindafólk og fjølmiðlafólk annars nýta skeivan málburð. Eisini skal málnevndin hjálpa til at finna orð fyri nýggjum hugtøkum, t.d. við í málbrævinum mæla til at nýta ávís orð og orðingar.

Í Orðafar nr.57 ber m.a. til at lesa um herðing, umframt fleiri dømi eru um skeivan og rættan málburð.

Teistin aftur í sigling

Strandfaraskipið Teistin, sum hevur ligið til umvælingar alla vikuna, fer nú aftur í sigling. Mánakvøldið noyddist Teistin at avlýsa síðstu túrarnar, og tað vísti seg at ein turbina var farin. Síðan tá hevur Sam røkt siglingina millum Gomlurætt, Skopun og út í Hest.

Deilurin kom til landið við flogfari fyrrapartin fríggjadagin, og á Strandferðsluni væntaðu tey, at Teistin aftur kundi fara í sigling seint fríggjadagin ella leygarmorgunin.

Japansk tunfiskaskip aftur í føroyskan sjógv

Hósdagin kom fyrsta av fýra japanskum tunfiskaskipum í føroyskan sjógv. Skipini skulu royna eftir tunfiski suður móti bretska markinum

FISKIVEIÐA
Jón Brian Hvidtfeldt

Fýra japansk skip hava fingið loyvi at royna eftir tunfiski í føroyskum sjógvi í ár. Talan er um royndarloyvi, sum bara verða givin fyri eitt ár í senn. Hósdagin kom fyrsta japanska skipið í føroyskan sjógv, og leygardagin kemur tað næsta. Hini bæði eru væntandi 8. og 9. september.

Japansku skipini hava roynt eftir tunfiski í Norðuratlantshavi, og tey fara nú í føroyskan sjógv at royna. Vanliga plagar tunfiskurin, sum ferðast heilt suður í Miðalhavið, at vera í føroyskum sjógvi umleið seks vikur. Hann ferðast nógv og flytir seg eftir veðrinum. Tunfiskur kann viga upp í 200 kilo, men meðalvektin á fiskinum, sum fæst í føroyskum sjógvi, liggur um 80-100 kilo.

Fiskirannsóknarstovan hevur ein eygleiðara umborð á hvørjum av teimum fýra japansku skipunum, nú tey fara í føroyskan sjógv at royna. Síðan verður ein frágreiðing gjørd um fiskiskapin, hvar skipini fáa tunfiskin, longd og vekt á honum osv.

Føroysku myndugleikarnir hava ikki mett tað vera ráðiligt at loyva fleiri enn fýra japanskum bátum at royna eftir tunfiski í føroyskum øki.

Samgongan ikki meiriluta

Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin halda tørn, meðan smáu samgonguflokkarnir missa sína umboðan á løgtingi, vísir nýggjasta veljarakanningin hjá Fregnir. Hevði val verið í dag, hevði Sambandsflokkurin verið stóri sigursharrin við 10 tingumboðum, meðan einki dryppar á Javnaðarflokkin

VELJARAKANNING
Jón Brian Hvidtfeldt

Heldur ikki hesaferð gevur mánaðarliga veljarakanningin í Fregnir samgonguni meiriluta. Sambært kanningini eru tey 17 tingumboðini, sum eru grundarlagið undir sitandi samgongu, tødnað niður í 15. Gallup Føroyar hevur hvønn mánað síðan valið 30.apríl gjørt eina veljarakanning, har gott og væl 500 føroyingar eru spurdir, hvønn flokk tey høvdu valt, var løgtingsval í dag. Úrslitið vísir, at samgongan ongantíð hevur havt meiriluta, síðan hon tók við.

Í juni-kanningini fekk samgongan 16 tingumboð, meðan bæði juli- og nú eisini august-kanningin bara gevur samgonguni 15 tingumboð. Í juni var tað Tjóðveldisflokkurin, sum misti áttanda mannin, meðan hinir samgonguflokkarnir hildu tørn. Síðan hevur Tjóðveldisflokkurin vunnið áttanda mannin aftur, men nú eru tað teir smáu flokkarnir, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin, sum missa sítt tingumboð. Á løgtingsvalinum 30.apríl fingu teir ávíkavist 4,4 og 4,2 prosent, men nú stuðla bara ávíkavist 3,1 og 3,2 prosent av fólkinum hesar flokkar, sum tískil ikki røkka upp um tinggáttina.

Sostætt ber til at siga, at meðan stóru samgonguflokkarnir so dánt halda tørn, báðir hava eina afturgongd uppá 0,6 prosent og varðveita sama tingmannatal, so høvdu smáu flokkarnir, sum í dag tryggja samgonguni meirilutan á løgtingi, ikki verið nakar stuðul, hevði val verið í dag.

Úr samgonguni til Sambandið

Veljarakanningin vísir, at tað er Sambandsflokkurin, sum fær allan ágóðan av minkandi undirtøkan hjá samgonguflokkunum, meðan undirtøkan fyri Javnaðarflokkinum er at kalla tann sama nú, sum á valinum 30.apríl.

Síðan løgtingsvalið er undirtøkan hjá Sambandsflokkinum vaksin úr 26 prosentum upp í 29,3 prosent, og flokkurin hevði fingið 10 tinglimir, hevði val verið í dag. Hin andstøðuflokkurin, Javnaðarflokkurin, fær als ongan ágóða av minkandi undirtøkuni hjá samgonguflokkunum, og undirtøkan fyri flokkinum er bara økt 0,3 prosent síðan 30.apríl.

Valentin Cora

Ferðandi tónleikari

Um ein tosar um grensur og mørk, kanska serliga landamørk, so er altíð okkurt at tosa um. Og um ein blandar hetta við tónleik, so er enn meir at tosa um. Ein ungur argentinskur gittaristur hevur verið á vitjan í Føroyum

Jóhann Jacobsen

Sjálvur hevur Valentin Cora verið aktivur í ungmannapolitikki í Brasil, tá hann búði í San Salvador

Sum tíðirnar eru í dag, so flytur menniskjan seg eisini meiri og meiri. Tónleikur, sum t.d. á eini fløgu, flytir seg nógv meiri enn vit gera. Fløgur, sum eru kendar og eisini minnið kendar, kunnu fáast í øllum verðins hornum. Eitt nú var ein vinmaður mín á veg heim við flogfari úr Sri Lanka. Har umborð kundi hann við CD-boksini í flogsetrinum, sum øll onnur ferðandi á hesum flogfarinum eisini kundu, velja at lurta eftir Eivør Pállsdøttir-fløguni ímillum 9 aðrar fløgur. Hetta er eitt dømi um, at føroyskur tónleikur eisini sleppur uppí part og er hetta, eftir ondini, vorðið sjálvsagt.

Tónleikarar flyta seg eisini nógv og fleiri gera eitt legg hendanvegin. Og á hesum sumrinum hava fleiri gestatónleikarar verið á konsertum, festivalum og stevnum.

Argentinskur gittaristur

Ein teirra var argentinskur gittaristur. Hann hevur ta síðstu tíðina verið í Føroyum á vitjan í einar 3 vikur. Um Ólavsøkuleitið fekk eg eitt lítið prát við hendan ferðandi tónleikaran. Hann fortelur, at hann hevur havt ein sera góðan túr og hevur fingið nógvan íblástur. Valentin Cora er frá lítla býnum San Martin De Los Andes. Býurin, sum hevur einar 25.000 íbúgvar, liggur tætt við markið til Chile. Her hevur hann búð tey síðstu 4 árini.

»I have to travel«

Valentin livir av tónleiki, hetta hevur við sær, at hann er noyddur at vera uppá fartin meginpartin av tíðini. Hetta er neyvan nakað luksuslív, men, sum hann sigur tað, »I have to travel«. Og hann greiðir víðari frá, at tónleikur altíð hevur verið ein stórur partur av hansara lívi og av hesi orsøk kemur tann nógva flytingin. Tá so summartíð er í stórbýnum Brasilia ella Buenos Aires, so spælir Blues Valentin Band har.

Blues Valentin Band er hansara bólkur, men manningin er ongantíð tann sama, hon skiftir, sum spælistaðið er ymiskt frá mánaði til mánað. Hann dámar væl broytingar, og sum tónleikari, og menniskja, heldur hann hetta vera mennandi:

»Changes are good, healthy – they keep you sharp«.

Í januar var Valentin í San Rafael, norðan fyri San Martin. Í Februar var hann aftur í San Martin og seinni í Baryloche. Tað var annars her hann møtti Kristiani Blak og Brandi Jacobsen, sum fingu ferðina til Føroyar í lag. Í apríl aftur í San Rafael. Og í juni mánaðinum Buenos Aires og Brasilia. Tað eru so serliga í hesum býum, at Blues Valentin Band er nógv umbiðið. Hetta er ein strang skrá. Manningin, sum hann spælir saman við í San Martin er oftast tann sama. Ein 50 ára gamal trummuspælari, sum rekur egnan handil og hevur familju, og ein 25 ára gamal professionellur keyboardspælari. Í Buenos Aires hevur hann oftast ein trummuspælara og ein bassspælara afturat sær.

Valentin Cora er tónleikari og fer óiva altíð, at hava okkurt við tónleik at gera. Hann fortelur, at hann altíð hevur verið umringaður av tónleiki. Vinir og kenningar hava allir havt okkurt við tónleik at gera. Blokkfloyta var hansara fyrsta instrument, men tá hann var 15 ár, sá hann, fyri fyrstu ferð eitt blues band spæla.

»Wow! This´s what I want to do«

Hetta var í brasilska býnum San Salvador, á einum staði, ið kallaðist »Atelier«. Hetta hevur nokk verið ein stór løta í hansara lívi. Bluestónleikurin er tað, hann mest leggur seg eftir og hann fortelur frá hesi løtuni í »Ateliere« sum nakað heilt stórt. »Wow! This´s what I want to do«, minnist hann seg hugsa.

Í San Salvado fór hann so, tá hann var 15 ára gamal, at ganga til gittaraundervísning innanfyri bluessjangruna. Her hevði hann ein lærara, ið hann kom at kenna sera væl og her fekk hann eisini ein, fyri hann, sera týdningarmiklan lærdóm. »How to learn« ella hvussu at læra allatíðina, altíð. Og innanfyri sama evni, vil Valentin vera við, at meðan teknikkur, innanfyri tónleikaspæl, hevur nógv at siga, so hevur ein annar partur minst líka nógv at siga. Tann parturin er tað, sum hann kallar, »at liva«. Man má seta hesar báðar partar saman og læra allatíðina. Gjøgnum tónleikin kann man deila við øðrum og vaksa saman við øðrum, men tað er meiri enn bara tónleikur í lívinum. Her viðmerkir Valentin heilhjarta, at hann hevur møtt eina rúgvu av einastandandi menniskjum og at hendan vitjanin hevur verið sera sera góð.

Politikkur og tónleikur...

Spurdur um hvat Valentin Cora heldur um, at blanda politikk uppí tónleik, svarar hann, at tónleikur handlar um »expressing and communication« ella tað at tala út og samskifti. »Politics is nothingelse but solving problems« og um øll hava eina rødd, tá kunnu øll vera nøgd. Sjálvur hevur hann verið aktivur í ungmannapolitikki í Brasil, tá hann búði í San Salvador.

»Politics is nothingelse but solving problems«

Í samband við tónleik, so eru ikki so nógv mørk, sum heild. T.d. er tann tjóðskaparligi politiski boðskapurin sterkur og veldigur, men hann hevur fleiri mørk, landamørk o.fl.. Politikkur hevur nakað við skipan at gera, millum menniskjur og natúruna, men natúran er ikki gjørd av mørkum, »...even the sky is not the limit.«

Annars leggur Valentin, eitt sindur burturfrá tí filosofiska prátinum, afturat, at hann ikki er vanur við, at vera staddur á oyggjum mitt úti í havinum.

»...even the sky is not the limit.«

San Martin liggur inni í landinum og har er veðurlagið als ikki líka skiftandi, sum tað er her. Hetta dámar honum væl og hann vónar at koma aftur skjótt.